TEKNISKI SKÚLIN
TÓRSHAVN

## Tekniski Skúlin í Tórshavn søkir lærarar

**Av tí, at ov fáar umsóknir vóru til størvini, verður lýst av nýggjum**

**Lærari til el-deildina**
Starvið, sum er eitt **fulltíðarstarv**, umfatar undirvísing á el-deildini.

Umsøkjarin skal hava sveinabræv sum elektrikari, hava prógv sum el-installatørur og minst 2 ára starvsroyndir innan yrkið. Neyðugt er at umsøkjarin hevur kunnleika til nýggjastu el-útgerð. Eisini er áhugi fyri støddar-, alis- og evnafrøði, og nýtslu av EDV, ein fyrimunur.

*Á el-deildini starvast 5 lærarar í føstum starvi og 1 verkstaðarhjálpari. Næmingarnir læra til elektrikara og ganga í skúla í 55 vikur tilsamans. Eisini verða SIT-næmingar undirvístir á deildini.*

**Lærari til timburdeildina**
Starvið, sum er eitt **fulltíðarstarv**, umfatar undirvísing á timbur- og snikkaradeildunum.

Umsøkjarin skal hava sveinabræv sum húsasmiður, og minst 2 ára starvsroyndir innan yrkið. Umsøkjarar við hægri útbúgving hava fyrimun.

*Timbur-og snikkaradeildinar eru í sama bygningi. Lærarnir skifta ímillum báðar deildirnar.*
*Á deildunum starvast 8 lærarar í føstum starvi og 1 verkstaðarhjálpari. Næmingarnir læra til húsasmið ella bygningssnikkara og ganga í skúla ávikavist 45 og 50 vikur tilsamans. Á deildini verða eisini SIT næmingar undirvístir.*

**Setanarkor til fast starv:**
Fyrstu 2 árini verða roknað sum royndartíð, har tann, sum verður settur í fast starv, má vera til reiðar at taka ta eftirútbúgving, tað verður seg pedagogiska/undirvísingarliga ella aðra førleikagevandi útbúgving, sum er neyðug fyri at verða settur í fast starv.

**Løn:**
Lønin verður sambært sáttmála millum Føroya Landstýri og FTL.

Størvini skulu setast 11. august 2003.

Skrivlig umsókn við upplýsingum um útbúgving, viðmælum og starvstíð skal vera skúlanum í hendi í seinasta lagi 26. juni 2003.

Meira fæst at vita um størvini við at venda sær til skúlan, tlf. 31 19 57

**Tekniski Skúlin í Tórshavn**
Marknagilsvegur 75 • P.o.b. 239 • FO - 110 Tórshavn
Tlf: 31 19 57 • Fax: 31 66 21 • E-mail: tst@ tst.fo

Sosialurin
-tað loysir seg

## Pedagogar

### til Bústovnin á Rúnarvegi og Sambýli á Líknargøtu

Innan Almannaráðið og stovnar undir tí, við fyribils tænastu á Bústovninum og Sambýlunum í Runavík, eru tvey pedagogstørv leys at søkja til setan 1. sept. 2003 ella eftir nærri avtalu.

Størvini vera sett sum tænastumannastørv, eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Pedagogfelag, lønt stigini 24-31 eftir lønartalvu pr. 01.03.03.

Annað starvið ið søkt verður eftir, fær til uppgávu at arbeiða í Sambýlinum á Líknagøtu 1, hjá 3 monnum við diagnosuni autismu. Hetta arbeiðið krevur at viðkomandi umsøkjari er kropsliga og sálarliga væl fyri, er førur fyri at kunna gera kropsligt arbeiði saman við monnunum, ganga túrar, svimja, gera fimleik o.a.

Hitt fólkið fær til uppgávu at arbeiða við teimum 6 menningartarnaðu íbúgvunum á Bústovninum á Rúnarvegi 6. Hesi krevja hjálp og vegleiðing í øllum tí, sum tey hava tørv á.

Arbeiðstíðin er 40 tímar um vikuna, skiftandi vaktir og annaðhvørt vikuskiftið. Starvsøkið er allur stovnurin, og tann setti kann rokna við at fáa aðrar uppgávur aðrastaðani í skipanini, um tørvur gerst á tí.

Nærri fæst at vita um størvini frá Oddfríðu Højgaard, leiðara á tlf. 226121.

Umsóknir við avriti av prógvum, viðmælum v.m. skulu vera stovninum í hendi innan 11. juli 2003.

**Bústovnurin á Rúnarvegi 6**
att: Leiðarin
FO-620 Runavík

## Kunngerð

### frá útskiftingarnevndini fyri Gjáar bygd

Útskiftingarfundurin, sum er lýstur at verða í bygdarhúsinum mikudagin 25. juni kl. 10, **er útsettur til mikudagin 16. juli kl. 10.**

Til viðgerðar verður útskifting av hagapartinum Dalur og Fløtur.

Nevndarlimir eru Jørleif Kúrberg, Tórshavn og Heri Samuelsen, Miðvágur.

**N. v.**
**Bjarni Hansen**
**útsk.form.**

*Gravarhjálp*

Marknagilsvegur 86
100 Tórshavn

*Tel 311723 - 211723 · Fax 321722*

Sosialurin 341800

## Pedagogur

Fyri pedagog í farloyvi verður søkt eftir pedagogi til ein stovn við 30 børnum í aldrinum 3-7 ár. Starvið er 25/30 tímar um vikuna á einari stovu við 15 børnum. Starvið verður at seta 01. september 2003 til 31. august 2004.

Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið. Starvið er lønt á lønarstigi 10-15.

Nærri upplýsingar um starvið og stovnin fáast við at venda sær til leiðaran.

Umsókn saman við avritum av prógvi og viðmælum verður at senda stovninum í seinasta lagi mánadagin 07. juli 2003.

Um eingin pedagogur søkir starvið, verður hjálparfólk sett í starv 30 tímar um vikuna.

**Barnagarðurin Vípan**
Vípuvegur 3
100 Tórshavn
Tlf. 31 75 35

## Verkfrøðingur/ Byggifrøðingur

Søkt verður eftir verkfrøðingi/byggifrøðing til spennandi starv innan byggi- og anleggsarbeiði. Tann, ið settur verður, kemur at arbeiða sum plássleiðari.

Starvið verður sett skjótast gjørligt.

Skrivlig umsókn við avriti av prógvum og CV skal sendast til

**P/F J & K Petersen**
Á Hjalla
Postboks 3179
FO-110 Tórshavn
í seinasta lagi 26.06.2003

Tlf. 315060
e-mail: JKP@JKP.FO

## Ársins keyp



Ford Mondeo 2000 TDI, árg. 2002.
Kostnaður: Einans 185.000 kr.

**Tlf. 222326**



**FK í Dr. Jakobsensgøtu sóknast eftir**

## handilslærlingi

**at byrja 1. september 2003**

Krøv/útbúgving:
FHS: 3 ára lærutíð
HH: 2 ára lærutíð
Student/HF: 2 ár og 18 vikur

Vit bjóða tveimum røskum fólkum – drongi ella gentu – við dirvi og áræði, eina útbúgving undir skipaðum viðurskiftum í einum handli, har lív er í.

Arbeiðstíð: 40 tímar um vikuna, frí annan hvønn leygardag.

Nakrar ferðir í lærutíðini verður farið á skeið í Danmark.

Okkara krøv:
Fyrikomandi, kundavinarligur, røkin, góð samstarvsevnir.

Løn:
Sbr. S&K sáttmálanum.

Umsókn:
Skrivlig umsókn saman við próvtøkuskjali skal sendast í seinasta lagi 5. juli 2003, merkt. *Lærlingur.*

Aðrir upplýsingar fáast við at ringja tlf. 311320 / 217593, Bo Møller.

**KEYPSSAMTØKAN**
í Dr. Jakobsensgøtu
Boks 349
FO-110 Tórshavn

## í Dr. Jakobsensgøtu søkir eftir ungfólki

Ert tú eldri enn 17 ár og hevur hug at vinna tær pening aftaná skúla tíð? – so er hetta kanska nakað fyri teg?

Keypssamtøkan í miðbýnum, sum selur flest allar húsarhaldsvørur, hevur ofta brúk fyri røskum ungum fólkum 2 ella 3 seinnapartar um vikuna og leygardagar – umleið 8-12 tímar um vikuna tilsamans.

Tað sum tú kemur at taka tær av er m.a.
- at sita við kassan,
- fylla vørur á hillarnar,
- vanlig rudding um dagin og tá handilin letur aftur,
- annars til alt fyrifallandi.

Ert tú áhugað/ur kannst tú ringja á tlf. 31 13 20 ella 21 75 93 ella uppaftur betur um tú støkkur inn á gólvið hjá okkum og fært eitt prát við leiðaran Bo Møller.

Størvini verða sett frá 18. aug. 2003.

**Keypssamtøkan**
Dr. Jakobsensgøta 6
Boks 349 · 110 Tórshavn

FAROE
LAW

bjóðar heimligar og altjóða loysnir

Tosið við:
Eyðfinn Jacobsen, advokat
ella
Kára á Rógvu, adv.fulltrúa
um tygara tørv

Tróndargøta 19
P.O.Box 1218
FO-110 Tórshavn
tel 359900 - fax 359901
mobil 219902 - 222857
faroe-law@faroe-law.fo
http://www.faroe-law.fo

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. 2933, Agip Faroe Branch (Filial av Agip Denmark B. V., Holland.

**Viðtøkur broyttar:**
05.05.2003.
**Nýtt navn:** ENI Faroe Branch (Filial av ENI Denmark, B. V. )

*Skráseting Føroya tann 20. juni 2003*

*Kristin Balle*

## ALMANNASTOVAN

## Sosialráðgevi

Søkt verður eftir sosialráðgeva til økisdeildini í Suðuroy at arbeiða fulla tíð frá 1. august at rokna ella skjótast tilber eftir henda dag.

**Um deildina.**
Á økisdeildini á Tvøroyri arbeiða 4 fólk.

Arbeiðs- og ábyrgdarøki hjá deildini er at:
- ráðgeva og vegleiða borgarum um rættindi og skyldur í sambandi við almannaspurningar
- seta í verk fyriskipanir sambært almannalóggávuna
- í serligum førum vísa til landsumfatandi eindirnar hjá Almannastovuni

Økið hjá deildini er Suðuroy.

Tær sosialu fyriskipanirnar, ið økisdeildin serliga tekur sær av eru
- ymiskar fyriskipanir sambært forsorgarlógini, sum landsumfatandi eindirnar hjá Almannastovuni ikki hava ábyrgdina av
- persónliga viðbót til pensiónistar sambært pensiónslógini
- samsýning fyri at ansa eldri og óhjálpnum heima
- tilráðingar í smb. við umsóknir um fyritíðarpensjónir

**Útbúgvingarkrøv og royndir**
- sosialráðgevaraútbúgving
- royndir innan almenna fyrisiting
- góður kunnleiki til EDV á brúkarastøði
- góður málburður í føroyskum, bæði munnliga og skrivliga

**Lønar- og setanarviðurskifti**
Setanar- og lønarviðurskifti eru sambært sáttmálan millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið.

Nærri upplýsingar um størvini fáast við at venda sær til John Mortensen, deildarleiðara á tlf. 371620.

Umsóknir við avriti av prógvum o.ø. skulu vera Almannastovuni, postsmoga 196, 110 Tórshavn í hendi í seinasta lagi 1. juli 2003.

### Útibarnagarðurin í Miðvági

Miðvágs kommuna søkir við hesum eftir

## Pedagogum og hjálparfólki

til Útibarnagarðin í Miðvági, at byrja 15. august 2003.

Løn sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Meira fæst at vita um størvini við at venda sær til Elsu Margit Davidsen, tlf. 223429 ella 333738.

Umsóknir verða, saman við upplýsingum um útbúgving, royndir og møguligum viðmælum, at senda til

**Miðvágs Kommunu**
370 Miðvágur

í seinasta lagi 8. juli 2003.

Kommunan skilar sær rætt, um ikki nøktandi umsóknir eru, at lýsa starvið av nýggjum.

## HANDILSLÆRLINGUR TIL ÍTRÓTTARHANDIL

Søkt verður eftir lærlingi til ítróttarhandil okkara at byrja skjótast tilber.
Starvið er fjølbroytt, spennandi og áhugavert fyri tann ið dámar væl at umgangast viðskiftafólk.
Tað er eisini møguleiki fyri at luttaka á ítróttarmessu í Danmark.

Lærutíðin við HH er 2 ár, og við FHS 3 ár. Í hesum tíðarskeiðnum skal næmingurin á skúla í Danmark 3 ferðir.

Vit vænta at tú ert fryntlig/ur, hevur góð samstarvsevnir, dugir væl at umgangast fólk og ikki bangin fyri at taka eina eyka hond í tá á stendur

Um tú ert tann rætti kunnu við bjóða tær eina spennandi lærutíð við nógvum avbjóðingum, samstundis sum møguleiki er fyri at halda fram í fyritøkuni eftir lokna lærutíð

Umsóknir við viðmælum verða at senda til:

P/F Thomas Dam Ítróttur
Postmoga 268
FO-110 Tórshavn

P/F THOMAS DAM
ÍTRÓTTUR • N. Finsensgøta 5 • Postsmoga 268 • 110 Tórshavn
Tel. 355 300 • E-mail: sporttd@post.olivant.fo

Sosialurin 341800